# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




## ÍF - Sumba

LANDSKAPPING

Leygardagin 4. oktober 2003

Kl. 14.00 í Fuglafirði

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

# ÍF - Sumba

**18. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum**
**4. oktober 2003**

## Leikskrá 9

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin*
*Jógvan A. Skaale*

**Kápumynd:**
*Gleðin var stór, tá ið dómarin brikslaði dystin ímóti AB av, og greitt var, at okkara menn komandi ár leika í bestu deildini. Ikki minst stoltur var venjari, Sigfríður - her í nýggja búnanum hjá ÍF*
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



# ? VIT TAKKA FYRI Í ÁR!

Nú skriva vit tær seinastu reglurnar í leikskránni í ár. Vit halda (tað skulu vit heist siga sjálvi), at leikskráin í ár hevur verið væl móttikin av áskoðarunum. Um tað er góða gongdin á vøllinum, sum ger, at so er, vita vit ikki, men vit halda, at TAÐ ER IKKI TÍ. Heldur er tað tí at tilfarið í skránni er viðkomandi; hon er ikki bert sett saman av lýsingum – sum eisini skulu til – men býti av hesum og redaktionellum tilfari hevur verið á eini leið.

Hvussu verður komandi ár er óvíst, men tað skal ikki vera nøkur loyna, at leikskráin er eitt gott íkast til rakstur av felagnum/fótbóltinum, tí stuðulin frá fyritøkum og einstaklingum er fyrimyndarligur, og tað vil nevndin nýta høvi at takka fyri. Tí er undarligt, um nú eingin leikskrá verður komandi ár. NEYVAN! Málið komandi ár er at fáa eina enn betri leikskrá, bæði hvat viðvíkur tilfari, prent- og pappírsgóðsku. Vit hava ætlanir um at gera ein "ordiliga" leikskrá. Tað hava tit, leikararnir og stuðlarnir uppiborið.

Eitt annað, sum nú móti kappingarenda frættist í bygdini – og uttanfyri – er at fótbóltsáhuga, er í fer við at seta á stovn eitt stuðulsfelag, sum skal taka sær av 1. deild. Fyrireikararnir hava havt fyrireikandi fund og kunnandi fund við aðal- og fótbóltsnevndina. Úrslitið av hesum samráðingum er, at stuðulsfelagið - sum tó enn ikki hevur skipa seg - hevur fingið heimildir frá ÍF at taka sær av 1. deildarliðið. Hetta arbeið er ógvuliga tíðar- og peningakrevjandi. Á hendan hátt fær fótbólts- og aðalnevndin betur stundir at taka sær av hinum deildunum, sum er eitt arbeiði, sum er ógvuliga týdningarmikið. Vit halda, at tað er gott at eitt stuðulsfelag er sett á stovn, og at tað eru fólk, sum veruliga brenna fyri sakini, sum mynda stuðulsfelagið. Góða eydnu við tí.

Nú fótbóltskappingarárið er við at enda, vilja tey í fótbóltsnevndini nýta høvi at takka øllum teimum, ið hjálpt hava til. Ein týðandi hjálp er koyringin til teir mongu dystirnar uttanbýggja, og her hava ávís foreldur hjálpt serliga væl til – tøkk fyri tað. Tað er tó ynskiligt, at enn fleiri foreldur og avvarðandi bjóða seg til at koyra.

Aðalfundurin hjá ÍF verður í februar/mars komandi ár, og í hesum sambandi heita sitandi limir í fótbóltsnevndini á bygdafólk, um at bjóða seg fram til nevndararbeiði; brúk er fyri tveimum, helst trimum fólkum.

Takk fyri í ár, og góðan dyst!





# VIT ERU AFTUR Í BESTU DEILDINI




Tað var líka við at tað varð lagt upp til eina finalu í dag, men aftur í ár gjørdust sumbingar ov stuttir. Svingandi avrik og óhepni høvdu við sær, at vit – ístaðin fyri Sumba - tryggjaðu okkum beinleiðis uppflyting áðrenn dystin í dag, meðan TB hevur tryggjað sær silvurkrónurnar og harvið ein eyka møguleika at røkka bestu deildini. Sumbingar endaðu sostatt á einum triðja plássið, og sum er kunnu argjamenn ikki røkka teimum, tí munurin áðrenn dystin í dag er seks stig. Tí er dysturin í dag, sum so, uttan týdning fyri liðini og kappingina. Tó so, so kann alt enda við, at AB og Sumba skulu enda kappingina við at spæla um triðja plássi í einum nýggjum dysti liðini millum. Hetta av tí at Sumba fekk viðhald í kæru um ólógligan leikara í dysti ímóti AB herfyri. AB varð dømt at tapa dystin, og Sumba fekk sostatt stigini. AB hevur kært avgerðina hjá kappingarnevndini fyri dómsnevndina. Avgerð er ikki fallin í málinum enn, men tað kann enda við, at dysturin skal leikast av nýggjum. Tí kann dysturin í dag hava týdning fyri Sumba. Men kenna vit sumbingar rætt, so fara teir – líkamikið útfallið av viðgerðini hjá dómsnevndini – at geva seg 100%. Tað ger teir hvørjaferð!

Tibetur tryggjaðu vit okkum pláss í bestu deildini næstseinasta vikuskiftið, tá vit vunnu 3-1 á AB heima. Okkara menn høvdu ferð á tann fyrsta hálva tíman, og tað var nóg mikið. – Argjamenn vórðu rendir um koll, dysturin avgjørdur og 1. deildarplássið tryggjað til stóra frøi fyri áskoðarar, leikarar og bygdafólk.

Hvussu liðið verður til dystin í dag er óvíst. Eitt er tó víst; Sverri verður ikki við í dag. -Hann fekk reyða kortið í Leirvík síðsta vikuskiftið. –Annars var innsatsurin í Leirvík einki at reypa av, og tað kann hava við sær, at venjarin ger nakrar útskiftingar, soleiðis at leikarar, sum ikki hava fingið nógva spælitíð í ár, sleppa at leika í dag. Men venjarin kann eisini lata verða við at gera útskiftingar, og lata teir "somu" leika dystin í dag. Men líkamikið hvør byrjar í dag og ikki, so eiga vit at enda við manér.

At enda ynskja vit á leikskránni ÍF-liðnum hjartaliga tillukku við góða úrslitinum, og góða eydnu í 1. deild. Eisini ein heilsan til venjaran, Sigfríð! Tú hevur gingið fremstur, og lagt gott í beini á leikarunum. Teir vita í dag, hvør uppgáva teirra er á vøllinum. Hetta er eitt krav til leikararnar og liðið, um man skal gera sær nakrar vónir at klára seg ímillum teir bestu í Føroyum. Teir hava tó framvegis nógv at læra, og tað kanst tú læra teir.

SIGNAR Á BRÚNNI SKRIVAR:

# 1. DEILDARFÓTBÓLTUR OG HVAT NÚ?

## Signar hugleiðir um kappingarárið og gongdina í ár, og hvørjar avgerðir nevndin skal taka, nú krøvini til leikararnar á besta liðnum gerast størri.



*Eins væl og leikararnir hjá okkum hava gjørt tað gott í ár, eins væl hava áskoðararnir á bakk-anum og hillini verið óførir at koyra á okkara menn. Einaferð fekk Samson toyggi, men lat tað fara. F.v. Sámal, Helgi, Samson, Steinbjørn, Herman, Kári, Jákup, Finnur og so hevur ein síðsti "troðka" seg uppá eisini*

Allir fuglfirðingar fegnaðust, tá ið 2.deildarliðið hjá ÍF megnaði at gerast gullvinnari í 2. deild í 2003 og sleppa at spæla í bestu deildini komandi ár.

Prátið millum manna er lívligt, og høvuðspurningurin er: Hvat nú? Hvat verður gjørt næsta ár, so at liðið framhaldandi verður í bestu deildini?

**Nøkur sjónarmið**

Meiningarnar eru nógvar og ymiskar, tó eru øll samd um, at málið má verða, at vit varðveita plássið í bestu deildini í fótbólti, og ikki detta niður aftur í 2. deild eftir stuttan steðg í bestu deildini. Hvør er skilabesta loysnin at røkka tí málsetninginum? Tað er av alstórum týdningi at hava ein góðan venjara. Sigfríður Clementsen hevur verið ein góður venjari, ið hevur gingið upp í sítt arbeiði við lív og sál. Heldur ikki eiga vit at gloyma, at undan honum høvdu vit Paula Jarnskor, sum somuleiðis legði alla sína orku í at skapa fuglfirðingum eitt gott lið.

Teir spælarara, ið hava myndað liðið í ár og í fjør, hava víst ein góðan moral við einum góðum samanhaldi. Trúgvu áskoðararnir hava somuleiðis havt alstóran týdning fyri liðið. Ein góð og virkin ÍF leiðsla hevur fylgt væl við øllum tí, sum hent er á ítróttarøkinum. Alt hetta tilsamans hevur givið megnar úrslit: ÍF er aftur í bestu deildini í fótbólti.

**Komandi kappingarár**

Røddir eru at hoyra, ið mæla til, at fuglfirðingar fara eftir nýggjum spælarum, ið skulu styrkja liðið, so vit verða verandi í bestu deildini. Aðrar røddir halda, at einki er skeivari enn at fara eftir teimum spælarum, sum rýmdu til onnur lið, tá ið fuglfirðingar fóru niður í 2. deild , júst tá ið vit høvdu tørv á tí besta fólkinum.

Aftur onnur halda, at verður farið út um Fuglafjørð eftir løntum spælarum, so er at fara eftir teimum bestu, so vit vita við vissu, at vit fáa nakað fyri íløgurnar, ið gjørdar verða í nýggjar spælarar.

Sjálvur haldi eg, at vit skulu hava í huga, hvørjir menninir vóru, ið spældu liðið upp í bestu deildina - ungir, evnaríkir spælarar, ið hava framtíðina fyri sær í fótbólti. Hesir spælarar eiga *(framhald á bls. 26)*



## TÚ



**Navn:** Trúgvi Nesá
**Føðingardagur:** 10.07.1980
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** í læru hjá KJ-Hydraulik
**Pláss á vøllinum:** bakkur; vinstri ella høgri
**Hædd og vekt:** 181 cm. og 97 kg.
**Yvirtrúgv:** havi onga
**3 orð sum lýsa teg:** fittur, ilsintur og tolin
**Torførast mótstøðumaður:** Fróði
**Frítíðarítriv:** fótbólt,
**Vónir fyri 2003:** vónirnar eru uppfyltar; vit eru fluttir upp í 1. deild

**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heimi-num:** helvtin av AC Milan liðnum og helvtin av Real Madrid liðnum.

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** vinardystur ímóti EB/Streymi í ár
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** umleið 1986
**Aðrar ítróttargreinar:** bara innandurafótbólt
**Minnigarríkasti dystur:** í smádreingjadeildini tá vit vunnu 1-0 á B36 í finaluni um Cadbury steypið
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** Sigfríður Clementsen
**Besti fótbóltsleikari:** Zinedine Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** bowling
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** millum 2 mál
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** at renna

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** seyðarhøvd og ein køld veðr
**Slag av tónleiki:** góður rokkur
**Sjónvarpssending:** Spin City
**At slappa av:** at sova
**Troyggja nr.:** nr. 3
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Maradona
**Sjónvarp/filmstjørna:** Mel Gibson
**Besta bók/blað:** Ferðaætlanin



O·N·L·Y
VERO MODA

>> vælkomin í KATO
Fuglafjørður




Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur

**Lastvognskoyring**




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**

**530 Fuglafjørður**
**tel. 444 245 ella 217 245**

**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |






**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og linuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (ídnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**

**Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manovri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.**

**KJ-HYDRAULIK**

P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com



Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490







Bílegging av pizza



www.pizza.fo

P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo




FONN FLOG

FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo





VØROSLAN
WEARHOUSE
I Stað • 530 Fuglafjørður • Tel. 444 747



TOYSTOVAN tel. 444637/444075 530 Fuglafjørður

SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum

Dumparum | Bingjubilum

530 Fuglafjørður tel. 44 41 77





Koyrið á ÍF....
..eg stuðli í øllum førum



**Tilfar til umvælingar,**
**ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**






Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**
Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lykliklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo



CLIMACOOL RESPW
**800⁰⁰**



REKORD
**700⁰⁰**



A CUB.TWIN STRI
**1.400⁰⁰**



SUPERSTAR II
**700⁰⁰**

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel.44 73 99 - fax 44 73 97



# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

## Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895

## Alfa Seafood Sp/f

Box 10 · FO-530 Fuglafjørður · Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 · E-mail: alfa@post.olivant.fo



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

Profa Farvur

v/Petur Gaardlykke · 600 Saltangará · tel. 44 91 49

## FAROE SEAFOOD

Fiskavirkið í Fuglafirði · Postboks 53 · tel. 444 500 · faks 444 580

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar takkar øllum lýsarum fyri dyggan stuðul.

Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Postboks 94 - 530 Fuglafjørður - tel./fax 444 636




Laminerarðir frontrútar til øll bilmerkir



# FLÜGGER

- Dygdarmáling til lágan prís
- Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin

*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09



# BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

## P/F Petur Larsen






*Reiðari innan frakt-*
*& sandbátar*
*Krana- og*
*lastvognskoyring*
*Sandsøla*

SANDGREVSTUR
Stovnað 1949
530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921




B S
**P/F BOÐASTEINUR**
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo




HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA

HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA

| | |
|---|---|
| UNDIRVATNSLJÓS | EL-MOTORAR |
| UNDIRVATNSKAMERA | EL-LUTIR |
| TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI | FREKVENS UMFORMARAR |
| ALARMSKIPANIR | EL-TALVUR |
| PLC-STÝRINGAR | FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP |

JT electric
JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

*Blómuhandilin*

## *Orkis*

*625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

*tel 44 82 89*
*fax 44 89 89*



## Danny Transport

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**



**Landsins størsta og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

- Steyp
- Heiðursmerki
- Heiðursbrøv
- Toy við búmerki
- Streamers
- Klistrimerki
- Seruppgávur við gravering

**Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

FA. **EILIF ARGE**
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76





## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358












**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



Nissan Micra

P/F **Meinhardt Arge**
við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 • fax 345401

## Bussar til øll endamál



Serflutningur til rørslutarnaði
Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands
Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands
Skúlabarnakoyring
Bygdaleiðir
Bussar frá 7 til 56 persónar

Spf. AP Andreas Poulsen BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20

FO-513 Syðrugøta - e-mail:pouand@post.olivant.fo

## Heimavirkis søla og framsýning

Piddasa handil

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

Gallari Ribarhús

Opið er:
mán.-fr: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71

## Altíð nýbakað breyð

Sunnumorgnar fæst breyð á hesum stoðum:
Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Statoil í Skálabotni
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum

Handilin er opin soleiðis:
Má-Ley: 07.00-17.30
Sun: 08.30-10.30

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388





ÚB

## Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

· www.bilar.fo

Bakkavegur · 530 Fuglafjørður · tel. 444 943 · fax 444 638 · Fartel. 281943

HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

GENTUFÓTBÓLTUR

## GENTURNAR
# SUM VUNNU SILVURKRÓNURNAR



*Gentur 14-17 ár, sum vunnu silvurkrónurnar í harðari kapping við eitt nú GÍ. Standandi f. v. Gunnvá Dam, venjari, Hanna Hansen, Nikolina, Hanna Poulsen, Astrid, Oda, Irdi. Sitandi f.v. Halda, Nicolina, Sigrid, Ragnhild, Erla, Guðrun, Lív. Á myndini vænta Durita Djurhuus, venjari, og Dania og Bára, sum eru av Skála.*

Í næstsíðstu viku varð endaliga staðfest, at vit endiliga hava fingið kvinnufótbóltin í bygdini uppá á eitt støði, har vit kunnu verða við aftur í kappingini. Tá eydnaðist tað nevnliga gentuliðnum 14-17 ár, at vinna silvurkrúnurnar í harðari kapping við m.a. grannarnar úr Gøtu.

Gunnvá Dam, sum í ár hevur vant genturnar saman við Duritu Djurhuus, sigur, at kappingin hevur verið ógvuliga jøvn. -HB hevur tó verið nógv tað besta liðið og hava tær ligið nógv fremstar alla kappingina. Liðið hevur verið manna við gentum úr bæði HB og B36, og harav hava fleiri eisini leikt á besta liðnum hjá teimum báðum feløgunum. Síðan hava hini liðini kappast um næstfremsta plássið, vísir Gunnvá á.

Endaspurturin varð ógvuliga tættur, og serliga vóru tað genturnar úr Gøtu, sum góvu okkara gentum skarpan gang. –Vit fóru framum GÍ í allar-seinastu umførunum, sum vórðu leikt í næstsíðstu viku. Av teimum trimum dystunum, sum leiktir vórðu, vunnu vit allar, meðan GÍ-genturnar snávaðu í tí eina. Tað avgjørdi harða dystin okkara millum og dystin um 2. plássið, sum vit sostatt vunnu, sigur ein fegin venjari.

Gunnvá vísir eisini á, at vit veruliga hava eitt gott gentulið, sum uttan iva – treytað av, at allar fara at leika fótbólt - er á veg uppeftir. Øll hini liðini í deildini høvdu lið í bestu deildini; tað vóru bert vit, sum einki høvdu, men kortini megnaðu genturnar at kappast við hini og vinna, sigur Gunnvá. Genturnar eru eisini ungar; allar uttan Oda, kunnu leika við liðnum aftur komandi ár, samstundis sum fleiri av berandi leikarunum á liðnum í ár, eru nógv yngri enn 14 ár, uttan at tær eru veikari enn tær eldru, sigur Gunnvá.

Gunnvá vónar, at genturnar halda fram at spæla fótbólt, tí hon er sannførd um, at genturnar eru somikið góðar, at tær um eitt ella tvey ár kunnu melda lið til í bestu kvinnudeildini. Tá hevði verið gott at fingið tær, sum góvust at leika fyri nøkrum árum síðani, og sum í dag eru um 20 ára aldur, at byrja aftur. Hesar hava tíverri ikki leikt fótbólt í eini trý ár, og tað heldur Gunnvá er sera spell, men tað nýtist kortini ikki at hava tann stóra týdningin.

Verður liðið melda til í bestu kvinnudeildini er hetta fyrstu ferð síðani tíðliga í nítiárunum, at vit leika kvinnufótbólt í bestu deildini, og so er at vóna, at tað verður varandi. Livst so spyrst!



# Stuðlið ÍF

## Keypið lutaseðlar til heimadystirnar

**Til síðsta heimadystirn hjá 2. deild í ár er møguleiki at keypa lutaseðlar. Drigið verður um 3 vinningar, umframt at drigið verður millum allar seldar seðlar í trimum teimum seinastu heimadystunum um eitt gávukort á 1.000,- frá P/F Haraldsen. Lutaseðlarnir kosta kr. 5,- fyri hvønn, og verða seldir í sølubúðini í ovaru hæddini, samstundis sum Helena fer at selja kring vøllin.**

***Minnist til: goymið seðlarnar!!***

## Vinnararnir seinast:

**Sodavatn, seðil nr. 37610**
**Sodavatn, seðil nr. 37696**
**Gávukort frá Muntra (døgurði fyri tvey), seðil nr. 37746**

***Vit enda fótbóltskappingarárið í Mentanarhúsinum í kvøld við gullveitslu og almennum dansi aftaná við Showmonnum (Kim, Jens Marni, Jóhannes og Kaj). Møtið fjølment!***

SIGNAR Á BRÚNNI SKRIVAR:

*(framhald av bls. 4)*

at gerast høvuðsbulurin á liðnum í komandi kappingarárið, saman við nøkrum heilt fáum nýggjum spælarum, ið hava havt royndir á liðum, ið hava spælt í bestu deildini.

Einki er at ivast í, at krøvini til spælararnar í bestu deildini, gerast væl størri enn í hinum deildunum, tí ferðin á spælinum er munandi meira. Møguleiki at spæla "túnafót-bólt" verður ikki meira. Nógv størri krøv verða sett til m.a. styrkina hjá spælarunum. Teir, ið ikki lúka tær treytir, ið settar verða av venjaranum, verða neyvan við – so einfalt er tað.

**Nevndin fer til verka**

Eg havi skilt, at nevndin er farin til verka, har nevndu spurningar, ið her eru tiknir fram, verða umrøddir. Tað er skilagott at fara so tíðliga sum gjørligt undir arbeiði, tí onnur feløg, ið fara at taka lut í bestu fótbóltsdeildini í komandi kappingarári, eru longu farin undir at leggja komandi árið til rættis, og tað skuldi ikki kløkka meg, um ikki okkurt av feløgunum fer at pikka uppá í Fuglafirði og bjóða um spælarar hiðani, og tað verður frá tí betra endanum, og óneyðugt er at siga, hvør verður meinast raktur av tí.

AT STYTTA SÆR STUNDIR VIÐ

# TIPS 13



## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Í kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi" vinnur besti tipparin í einstøku kappingunum ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur/veitst eru rættir. Skrivað navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í ítróttarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hasaferð fært tú at vita í næstu leikskrá. Svarini og vinnarin frá seinast eru á bls. 31.*

Navn:

Bústaður:

Telefon:

*TIPS 13 seðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 min. eftir loknan dyst.*

### ÍF TIPS 13 (set x í rætta rútin)

| 9. UMFAR | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvat felag vann FM í 1998? 1. HB X. B36 2. KÍ | | | |
| 2. Hvørjum landslið hevur Føroyar størsta ósigur ímóti? 1. Ísland X. Yugoslavia 2. Noreg | | | |
| 3. Nær er B36 stovnað? 1. 1935 X. 1936 2. 1937 | | | |
| 4. Nær hevur Trúgvi føðingardag? 1. 10. Juni X. 25. Juni 2. 10. Juli | | | |
| 5. Hvat lið leikar heimadystir sínar á Weserstadion? 1. Stuttgart X. FC Koln 2. Werder Bremen | | | |
| 6. Hvar er Joe Royle venjari? 1. Reading X. Norwich 2. Ipswich | | | |
| 7. Hvørjum felag hevur Brian Laudrup IKKI leikt fyri? 1. Bayer Leverkusen X. Bayer Munchen 2. Bayer Uerdingen | | | |
| 8. Á hvørjum landsliðið leikar Stern John? 1. USA X. Costa Rica 2. Trinidad & Tobago | | | |
| 9. Hvussu nógv lið hava vunnið Premier League? 1. Tvey X. Trý 2. Fýra | | | |
| 10. Hanus er klárari offside position, tá ið hann fær eina avlevering frá Jonn. Áðrenn dómarin fær tið at floyta, leypur ein mótleikari í egnum brotsteigi upp og loftar bóltinum. Hvat ger Dómarin? 1. Straffispark X. Gult kort + Óbeinleiðis frispark 2. Óbeinleiðis frispark | | | |
| 11. Hvussu nógvar EM kappingar hava verið? 1. 11 X. 12 2. 13 | | | |
| 12. Hvat lið vann Conference League 2002/2003? 1. Dag & Red X. Yeovil 2. Farnborough | | | |
| 13. Hvussu nógv mál skoraði Diego Maradona í sínum 91 landsdystum 1. 25 mál X. 34 mál 2. 45 mál | | | |

Føroya Bjór ATLANTIC AIRWAYS



Klipp ella skrøð

# HAGTØL & FAKTA

### STØÐAN 2. DEILD MENN - 28. september

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. ÍF | 17 | 12 | 3 | 2 | 36-15 | 39 | 8-0-0 | 4-3-2 |
| 2. TB (N) | 17 | 11 | 2 | 4 | 50-23 | 35 | 8-0-1 | 3-2-3 |
| 3. Sumba | 17 | 9 | 5 | 3 | 36-15 | 32 | 4-4-0 | 5-1-3 |
| 4. AB (U) | 17 | 7 | 5 | 5 | 34-23 | 26 | 5-2-2 | 2-3-3 |
| 5. B36 | 17 | 6 | 4 | 7 | 29-23 | 22 | 4-1-4 | 2-3-2 |
| 6. KÍ | 17 | 7 | 1 | 9 | 32-51 | 22 | 6-0-2 | 1-1-7 |
| 7. B71 | 17 | 6 | 2 | 9 | 28-22 | 20 | 4-2-2 | 2-0-7 |
| 8. VB | 17 | 6 | 2 | 9 | 28-27 | 20 | 4-2-3 | 2-0-6 |
| 9. LÍF | 17 | 6 | 1 | 10 | 23-44 | 19 | 3-1-5 | 3-0-5 |
| 10. B68 (U) | 17 | 2 | 1 | 14 | 9-62 | 7 | 2-1-6 | 0-0-8 |

### LEIKARAHAGTØL 2. DEILD MENN 2003:

| Nr. | Leikari | D | Min | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | 13 | 1170 | | | | 1 | -14 | 70 |
| 2 | Áki Petersen | 16 | 1440 | | | | | 1 | 418 |
| 3 | Jan Skoradal | 17 | 1455 | | 1 | 1 | | | 58 |
| 4 | Viggo Johannsen | 17 | 1530 | | | | | 1 | 101 |
| 5 | Heini Heinason | 9 | 314 | 2 | 6 | | | 4 | 19 |
| 6 | Fritleif í Lambanum | 9 | 165 | | 9 | 1 | | 1 | 65 |
| 7 | Martin Hansen | 2 | 96 | | 1 | | | | |
| 8 | Sverri Ellingsgaard | 13 | 891 | 6 | 1 | 2 | 1 | | 255 |
| 9 | Rúni Petersen | 6 | 167 | 1 | 5 | | | 1 | 45 |
| 10 | Hanus Eliasen | 17 | 1437 | 4 | 1 | 1 | | 7 | 436 |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen | 17 | 1467 | 5 | | 2 | | 5 | 274 |
| 12 | Árni Petersen | 8 | 574 | 2 | 2 | | | | 17 |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 7 | 354 | 2 | 3 | | | 1 | 9 |
| 14 | Ken Bærentsen | 14 | 1033 | 8 | 1 | | | 6 | 192 |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 11 | 441 | 1 | 8 | 1 | | | 57 |
| 16 | Jákup Helgi Egholm | 4 | 360 | | | | | -1 | 4 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 16 | 1438 | 1 | | 2 | | 7 | 179 |
| 18 | Atli Petersen | 15 | 964 | 12 | 2 | 1 | | 1 | 241 |
| 19 | Roy Róin | 9 | 416 | 2 | 5 | 1 | | 1 | 23 |
| 20 | John S. Thomsen | 11 | 882 | 3 | | 4 | | | 270 |

| | | |
|---|---|---|
| Ayersome Park VAR heimavøllur hjá? | 2 | *Middelsborough* |
| Hvar er Lothar Matthaus venjari? | 2 | *Partizan Belgrad* |
| Hvørjum felag hevur Pierre van Hooijdonk IKKI leikt ...? | 1 | *Boavista* |
| Á hvørjum landsliðið leikar Jose Clayton? | 1 | *Tunesía* |
| Frá hvørjum felagi keypti Real Madrid Ivan Helguera? | X | *Espanyol* |
| ...). Áðrenn dystar byrjan verður Lutakast, tað liðið í ...nnu lutakastið skal velja | X | *Síðu* |
| Hvussu nógvar HM kappingar hava verið? | 2 | *17* |
| Hvat lið vann "Cup Winners Cup" í 1991? | 1 | *Manchester Utd.* |
| Hvussu nógv mál skoraði Ian Rush fyri Liverpool í ...um 616 dystum? | 2 | *312* |

### Aðrir dystir í dag 2. deild

B71 - TB

B36 - B68

VB - LÍF

KÍ – AB

### Dystir í 1. deild 04.10 - 18. umfar

Skála - EB/Streymur

NSÍ - FS Vágar

HB - BKÍ

GÍ - B36

VB - B68

### Dystir í 3. deild 04.10 - 18. umfar

NSÍ - FS Vágar

Skála - EB/Streymur

HB - TB

GÍ - B36

Royn - ÍF

### Málskjúttar - 2. deild

| | |
|---|---|
| Kaj Roest, TB | 13 |
| Eirikur Joensen, Sumba | 10 |

Hanus Eliasen, tel. 22 17 52

***Smápiltar:***

Atli Petersen, tel. 26 82 95

***Gentur:***

Durita Djurhuus, tel. 44 50 24

***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***

Jónfríð Joensen, tel. 254170

***Yngst:***

Hanna Poulsen

KAPPING

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## TVEYMÁLSSKJÚTTIN BESTUR Í AVGERÐANDI DYSTINUM



Í 3-1 sigrinum ímót AB næstseinasta vikuskiftið valdu áskoðararnir tveymálskjúttan, Eyðolv, at vera besta leikaran. Fyri at vera bestur maðurin fær Eyðolvur ein ein døgurða-bita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku.

***Leggið til merkis!!*** Tað eru bert áskoðararar til dagsins dyst, sum kunnu atkvøða, og tað er bert **ein** atkvøðuseðil pr. áskoðara. Er tað onkur sum letur fleiri atkvøðuseðlar inn, verður bert tann eini tikin við.

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttar-húsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

**Atkvøðutal**

| | ÍF-AB | Íalt |
|---|---|---|
| Eyðolvur | 90 | 274 |
| Áki Petsersen | 57 | 418 |
| Høgni Zachariasen | 37 | 179 |
| Hanus Eliasen | 36 | 436 |
| Eyðun Ryggshamar | 22 | 57 |
| Fróði Poulsen | 5 | 70 |
| Roy Róin | 4 | 23 |
| Atli Petsersen | 2 | 241 |

Bústaður:

Telefon:

*TIPS 13 seðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 min. eftir loknan dyst.*

| | | | |
|---|---|---|---|
| brotsteigi upp og loftar bóltinum. Hvat ger Dómarin? 1. Straffispark X. Gult kort + Óbeinleiðis frispark 2. Óbeinleiðis frispark | | | |
| 11. Hvussu nógvar EM kappingar hava verið? 1. 11 X. 12 2. 13 | | | |
| 12. Hvat lið vann Conference League 2002/2003? 1. Dag & Red X. Yeovil 2. Farnborough | | | |
| 13. Hvussu nógv mál skoraði Diego Maradona í sínum 91 landsdystum 1. 25 mál X. 34 mál 2. 45 mál | | | |

Föroya Bjór ATLANTIC AIRWAYS

Klipp ella skrædd

## VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Restaurant Muntra

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- títt keyp -





# SØLUBÚÐ Í OVARU HÆDDINI Í ÍTRÓTTARHÚSINUM

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. Liðnum, eru aftur í ár til dystin fús. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til beint eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisni í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin.



### ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Vinnarin seinastu ferð gjørdist Heri Nesá við 7 røttum. Hann vann við lutakasti við trimum øðrum. Fyri at vera besti tipparin fær Heri ein sodavatnskassa frá Føroya Bjór. Tillukku við tí. Hann sleppur somuleiðis út at bowla við 1. liðshópinum seinni í heyst, og so er hann eisini við í lutakastinum um Apex-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways. Vinnarin av ferðini verður avdúkaður í kvøld á veitsluni í Mentanarhúsinum

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| ÍF TIPS 13 - Spurningar og svar - 8. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá Skála? | X | ***Jóhan Nielsen*** |
| 2. Hvuusu eitur nýggi landsliðsleikarin hjá Føroyum? | 2 | ***Christian Lamhauge Holst*** |
| 3. Nær er LÍF stovnað? | 1 | ***1928*** |
| 4. Hvat torir Trúgvi ikki? | 1 | ***Inn á vøllin við læknataskuni, tá spælari er skaddur*** |
| 5. Ayersome Park <u>VAR</u> heimavøllur hjá? | 2 | ***Middelsborough*** |
| 6. Hvar er Lothar Matthaus venjari? | 2 | ***Partizan Belgrad*** |
| 7. Hvørjum felag hevur Pierre van Hooijdonk <u>IKKI</u> leikt fyri? | 1 | ***Boavista*** |
| 8. Á hvørjum landsliðið leikar Jose Clayton? | 1 | ***Tunesia*** |
| 9. Frá hvørjum felagi keypti Real Madrid Ivan Helguera? | X | ***Espanyol*** |
| 10. Áðrenn dystar byrjan verður Lutakast, tað liðið í stinnu lutakastið skal velja | X | ***Síðu*** |
| 11. Hvussu nógvar HM kappingar hava verið? | 2 | ***17*** |
| 12. Hvat lið vann "Cup Winners Cup" í 1991? | 1 | ***Manchester Utd.*** |
| 13. Hvussu nógv mál skoraði Ian Rush fyri Liverpool í sínum 616 dystum? | 2 | ***312*** |

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Bárður Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 22 10 37
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

| ÍF | Sumba |
|---|---|
| 1. Fróði Poulsen | 23 Marzin Dawid |
| 2. Áki Petersen | 3 Sólfinn Kjærbo |
| 3. Jan Skoradal | 4 Páll M. Kjærbæk (liðsk.) |
| 4. Viggo Johannesen | 5 Norbert Kuczak |
| 5. Heini Heinason | 6 Dánjal J. Joensen |
| 6. Fritleif í Lambanum | 7 Eirik Joensen |
| 7. Martin Hansen | 8 Bjørn Thorsteinson |
| 8. Sverri Ellingsgaard | 9 Karl Lisberg |
| 9. Rúni Petersen | 10 René Thomsen |
| 10. Hanus Eliasen | 11 Sonne Kjærbo |
| 11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.) | 13 Suni úr Hørg |
| 12. Árni Petersen | 15 Jan Poulsen |
| 13. Høgni á Lakjuni | 17 Robert Cieslewicz |
| 14. Ken Bærentsen | 21 Hans J. Thomsen |
| 15. Eyðun Ryggshamar | 20 Robert Zamair |
| 16. Jákup Helgi Egholm | |
| 17. Høgni Zachariassen | |
| 18. Atli Petersen | |
| 19. Roy Róin | |
| 20. John S. Thomsen | |

| ÍF | | Sumba | |
|---|---|---|---|
| Venjari: | Sigfríður Clementsen | Venjari: | Robert Cieslewicz |
| Hj.venjari: | | Hj.venjari: | |
| Liðleiðarar: | Trúgvi Nesá<br>Tórstein Joensen | Liðleiðari: | Frits Poulsen |

## Dómarabólkur:

Dómari: Suni Johansen, SÍF
Hjálpardómarar úr Síf

## Bóltsponsorur:

Sp/f Jan Mohr